

# William og Jørgen-Frantz í Norðurlandahúsinum

*Ráðstevna um William Heinesen og Jørgen-Frantz Jacobsen í Norðurlandahúsinum 25. - 27. mai. Malan Marnersdóttir og Turið Sigurðardóttir, Fróðskaparsetri Føroya, hava fakligu fyristílingina um hendur*

**LUTTØKA OG TEKNING**

Millum 70 og 80 fólk hava teknað seg til ráðstevnuna, sum verður 25. - 27. mai í Norðurlandahúsinum. Ráðstevnan byrjar hósmorgunin 25. mai klokkan 8.30 við skráseting av luttakarum og útflýggjan av tilfari og kl. 9 byrjar fyrsti fyrilesturin. Tað ber til at tekna seg í Norðurlandahúsinum fram til ráðstevnuna og meðan hon er. Luttøkugjaldið er 400 kr. fyri alla ráðstevnuna, 150 kr. fyri einstakar ráðstevnudagar. Fyrilestrarnir verða á donskum, norskum og enskum.

**ENDAMÁL**

Merkishøvundarnir William Heinesen og Jørgen-Frantz Jacobsen vórðu føddir fyri hundrað árum síðan. Fróðskaparsetur Føroya og Norðurlandahúsið gera vart við hetta tíðarmótið við ráðstevnu, ið er ætlað til at stimbra granskingina av ritverkunum hjá høvundunum báðum.

Teir aldust upp í tí dansktmæltu borgaraligu mentanini í Havn, skrivaðu skaldskap sín á donskum, vórðu týddir á onnur mál og gjørdust navnframir. Annar skrivaði bøkur av flestum skaldskaparsløgum gjøgnum langa ævi og vann alsamt størri virðing sum skald. Hin var, tá ið hann doyði 37 ára gamal, kendur fyri politisku blaðskriving sína í Føroyum og Danmark og eftir deyðan gjørdi skaldsøgan *Barbara* navn hansara heimskent.

Ritverkini spegla - bæði gjøgnum yrkisevnini og málsliga hamin - ávís eyðkenni á søguligu og samfelagsligu støðuni hjá ungum tjóðum, sum eru um at mynda sín tjóðskaparliga samleika. Eitt endamál hjá ráðstevnuni er at varpa ljós á hesar tættirnar í ritverkunum við at seta tey í søguligt høpi, tulka og meta tey sum part av føroyskari eins væl og norðurlendskari og almennari nútíðarbókmentasøgu. Harumframt er tað endamálið við ráðstevnunni at eggja til bókmentafrøðiliga gransking av verkunum, teirra list, máli og mentanarliga samteksti, støðu teirra í føroyskari og norðurlendskari bókmentasøgu og mentan.

**HØVUÐS-FYRILESTRAR**

Á ráðstevnuni halda seks innbodnir røðarar høvuðsfyrilestrar: ein rithøvundur, ein tónleikafrøðingur og fýra bókmentafrøðingar. Hesir fyrilestrarnir fevna um yrkingar Williams Heinesens, um danska-føroyska sálmasiðvenju, um at skriva tjóðarbókmentir a málinum hjá harratjóðini, um tvífalt, danskt-føroyskt, sjónarhorn, brævaskiftið millum William Heinesen og Jørgen-Frantz Jacobsen, meting av brøvunum sum teksti og heimild, hugleiðingar hjá einum føroyskum rithøvundi út fra´lívinum hjá stórskaldinum William Heinesen. Teir einstøku høvuðsrøðararnir verða stutt kunnaðir niðanfyri.

***Torben Brostrøm*** professari, Danmark, er serliga kendur fyri slóðbrótandi skriving sína um lýriska modernismu í Danmark. Eisini hevur hann skrivað yvirlitsverk um danskar og svenskar bókmentir. Tvey greinasøvn hansara eru *Versets løvemanke* 1960, og *Modernismen før og nu* 1983. Á ráðstevnuni fer hann at røða um skaldskap í bundnum máli eftir William Heinesen. Við støði yrkingini "Olympia" (*Hymne og harmsang*) fer hann at hyggja at tí "organicistiska" myndamynstrinum í yrkingunum hjá William Heinesen, spenninginum millum tær elstu yrkingarnar og menningina frá *Den dunkle Sol* og longri fram.

***Marianne Clausen*** , cand. mag. Danmark, hevur saman við pápa sínum Karl Clausen savnað inn sálmar og andligar vísur í Føroyum. Hon greiddi til útgávu *Hundredesyv-visebogen* við donskum vísum og føroyskum løgum, 1995. Hon fer at røða um andligan vísusang, Kingo-sang og Petter Dass-sang, sum eru partur av tí mentanarliga viðførinum hjá rithøvundunum. Dømi verða givin úr verkunum hjá William Heinesen og Jørgen-Frantz Jacobsen um at hesin andligi skaldskapurin verður umrøddur og siteraður. Eisini verða givin dømi um slíkan sang, livandi - Petra Iversen syngur - og av bandi.

***Seamus Deane***, professari, Dublin. Er kendur fyri gransking sína av írskum bókmentum. Hevur millum mangt annað skrivað *A short History of Irish Literature 1986* og *Reading in the Dark*, sjálvsævisøguliga skaldsøgu, 1995.Í fyrilestri sínum fæst hann við ymsar spurningar viðvíkjandi írskum bókmentum og enska málinum:

Hvørja ávirkan hevði Hungursneyðin Harða 1845-50 á lagnuna hjá enskum og írskum máli í Írlandi? Hvussu eiga vit at meta tað tungusnildi, sum orð gongur av írskum høvundum fyri, eitt nú Swift og Joyce? Hvat er sambandið millum tungusnildi og øðrumegin afasi, hinumegin skuldarkenslu fyri mist, uppgivið ella burturskúgvað mál? Hví eru írskir høvundar so upptiknir av, at málið ikki er ført fyri at umboða verðina nøktandi? Er nakað samband millum hetta og tey politisku og fíggjarligu viðurskifitini millum Stóra Bretland og Írland síðani 1690? Er, at enda, nakað samband ella røð av sambondum millum afasi, tungusnild og grimd, serstakliga tað slagið av grimd, sum eyðkennir hjálandaskipanir?

***Leyvoy Joensen***, Ph.D., USA, nevnir fyrilestur sín "Barbara and the Dano-Faroese Moment." Hon bendir á tað tvífalda sjónarhornið: at vera heima og fremmandur í senn, sum er ímynd av donsku-føroysku lívsroyndunum, ið fáa Jørgen-Frantz Jacobsen og William Heinesen at lýsa Føroyar sum staðin, har miðøld og modernitetur bresta saman uttan íhald, so at av stendst tann gandakenda ógildingin av veruleikagrundregluni. Tað merkisverdasta uppáhaldið hjá Jørgen-Frantz Jacobsen um danskan-føroyskan samleika er tað málið, sum fyrstu ferð sær dagsins ljós í *Barbaru*, danskt gjøgnumvovið av "faroismum", skemtiligur arkaiskur og kortini frálíka lætt lisin prosastílur. Eyðvitað hvørvur tað danska-føroyska í týðing, og Barbara varð lisin í týðingum sum spenningsbókmentir, tí hon kom ov tíðliga til at fáa spjaldrið "magisk relalisma," ið júst verður nýtt um eftirhjálanda (post-colonial) bókmentir, skrivaðar á málum hjálandaveldanna.

***Oddvør Johansen***, rithøvundur, Tórshavn, nevnir røðu sína "Manden i den magiske cirkel." Hon tekur støði í lívinum hjá William Heinesen og har nemur hon eisini við sambandið millum teir báðar Jørgen-Frantz. Hvør var støðan hjá hjá Williami í føroyska samfelagnum, meðan hann livdi? Tað var ikki "politiskt korrekt" at lesa William í Føroyum, tá ið hann var í hæddini sum rithøvundur. Eins og so nógv onnur noyddist hann at rýma úr samfelagnum, gerast desertørur.

***Hanne Flohr Sørensen***, Ph. D, Danmark, hevur kannað brævaskiftið millum Jørgen-Frantz Jacobsen og William Heinesen í *Det begyndte som en leg* 1992, og hevur í *Fróðskaparriti* 1999, skrivað greinina "Mit forhold til det danske sprog er fatalt bestemt" um bakgrund og avleiðingar av danska málinum í verkunum hjá William Heinesen. Fyrilestur hennara snýr seg júst um brævaskiftið millum Jørgen-Frantz Jacobsen og William Heinesen. Hon fæst við spurningin um privatbrøv sum tekstaslag. Hvar standa vit sum lesarar, fremmand og langt aftaná, mótvegis brøvum millum tveir, ið kendu hvønn annan inn at sálini? Tað opinskáraða og spontana í brøvunum, sum stundum ger tað torført at lesa brøvini, er samstundis tað sum ger tey so hugtakandi og upplýsandi.

**STUTTIR FYRILESTRAR**

Umframt høvuðsfyrilestrarnar verða stuttar framløgur, 20 minuttir hvør. Av framløgum um ritverkið hjá William Heinesen kunnu nevnast tvær um *Den dunkle Sol*, annar um evni og kenslu í yrkingasavninum, hin um formlig viðurskifti. Ein verður um karnevals-eyðkenni í søgum Williams og ein um "Grýlana"; um leiðarorðini í *Tårnet ved verdens ende*, um frásagnarviðurskifti í *Laterna Magica.* Av framløgum um Jørgen-Frantz verður ein við heitinum "Barbara, en fremmed fugl?" Ein onnur ber saman skaldsøguna *Barbaru* og filmin hjá Nils Malmros. Røtt verður um frá italsku útgávuni av *Barbaru* frá 1941 og um ein part av yrkisbókmentunum hjá Jørgen-Frantz Jacobsen ella *Færøerne, Natur og Folk*, 1936.

**Lesið um »Úthavsdagar« á: HTTP:// WWW.SLEIPNIR.FO SETUR/TILTOEK OCEANDAGE_SKRA.HTM**









**ÍtróttaSosialurin kann sjálvandi eisini lesast á alnetinum:**

**www.sosialurin.fo**

# Stórliðini í fullari ferð

*Fimta umfar hjá kvinnunum fór aftur um bak í vikuskiftinum. Í bólki A fekk B36 endurreisn eftir stórtapið í Klaksvík, meðan KÍ eisini vann trygt á Eiði. Í bólki B vann HB tepurt í Sumba, meðan VB vann sannførandi á Argjum. Tey stóru liðini leggja luft millum seg og hini liðini*



*Toppskjúttin í fjør, Rakul N. Joensen, gjørdi trý mál í stórsigrinum á NSÍ, men kortini øktist munirin upp til Halltóru Joensen úr VB*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

Heini í Skorini

Í bólki A var oddaliðið HB og vitjaði botnliðið í bólkinum, Sumba. Áðrenn dystin var líkt til, at hetta fór at vera ein lættur sigur til HB, men tá avtornaði var munurin bert eitt mál. Fyri HB skeyt Eyðfríð Christiansen bæði málini, og eftir øllum at døma tykist hon vera ein sera týðandi leikari hjá HB í ár. Málið hjá sumbingum skeyt Rebekka Lisberg, og hóast munurin sum sagt ikki gjørdist serliga stórur, fór HB enn einaferð avstað við øllum stigunum, og hevur nú fult stigatal fyri teir fimm dystirnar, ið tær hava leikt.

Úti á Argjum tók AB ímóti VB, og hesin dysturin endaði 8-1 til VB. Stóri málskjúttin í føroyskum kvinnufótbólti, Halltóra Joensen, var stutt sagt ikki til at steðga, og hon skeyt ikki minni enn fimm av teimum átta málunum, sum vágbingarnir megnaðu at hála í land. Hini trý fekk ein annar sera týðandi leikari hjá VB, Guðrið Mortensen. Málið hjá AB gjørdi Elin Kathrina Haraldsen, og sostatt geva vágbingarnir havnarkvinnunum harða mótstøðu um fyrsta plássið í bólki A.

Dysturin millum GÍ og Skála skuldi upprunaliga spælast í Gøtu, men tá stevna var, varð dysturin fluttur inn á Skála. Dysturin endaði heldur óvænta við, at Skála vann 2-0. Fyrra málið hjá Skála skeyt Elin Jacobsen, meðan vit tíverri ikki fingu fatur á, hvør skoraði tað seinna. Skála er nú komið upp á triðja pláss í bólki A, og liggja nú væl fyri at koma víðari til endaspælið.

Seinastu ferð at kvinnufótbólturin varð umrøddur í blaðnum varð nevnt, at tað verður ein rein sensatión, um HB, VB og GÍ ikki koma víðari. Men nú er myndin vorðin heilt øðrvísi, og Skála hevur góðan møguleika at koma til „hitt lovaða landið“, har seks tey bestu liðini fara at kappast um føroyameistaraheitið.

**B36 fekk endurreisn**

Eftir at B36 í bólki B fekk ein dyggan frammaná í Klaksvík seinasta vikuskiftið, fingu tær endurreisn hetta vikuskiftið og vunnu ikki minni enn 8-0 á NSÍ. Rakul N. Joensen gjørdi hat-trick, meðan Maibritt Joensen, Súsanna Hansen, Alice Abrahamsen, Arnbjørg Danielsen og Elsebeth Jónsson allar fingu hvør sítt.

Alt bendir á, at KÍ kvinnurnar vera ringar at syfta í ár. Tær hava spælt sera væl higartil, og tær hava, eins og HB í bólki A, fingið fulla úrtøku burtur úr teimum fýra dystunum tær hava leikt. Í vikuskiftinum vóru tær á Eiði og leiktu móti EB/Streymi, og hesaferð vunnu tær 7-0. Rannvá Andreassen vísti enn einaferð sína styrki sum áleypari og skeyt fýra mál, meðan Malena Josephsen fekk tvey og Vivann Bjartalíð eitt.

(Í dystinum millum Skála og Sumba næstseinasta vikuskiftið, sum Skála vann 3-2, eydnaðist okkum ikki at fáa at vita, hvør skeyt málini hjá Skála. Vit kunnu hervið siga, at systrarnar Anna og Poula Olsen gjørdu ávikavist tvey og eitt mál.)

**Bólkur A**

**Sumba-HB 1-2**
Sumba: Rebekka Lisberg 1.
HB: Eyðfríð Christiansen 2.

**AB-VB 1-8**
AB: Elin Kathrina Haraldsen 1.
VB: Halltóra Joensen 5, Guðrið Mortensen 3.

**Skála-GÍ 2-0**
Skála: Elin Jacobsen 1, fingu ikki at vita, hvør skeyt seinna.

**Bólkur B**

**B36-NSÍ 8-0**
B36: Rakul N. Joensen 3, Arnbjørg Danielsen 1, Súsanna Hansen 1, Alice Abrahamsen 1, Maibritt Joensen 1, Elsebeth Jónsson 1.

**EB/Streymur-KÍ 0-7**
KÍ: Rannvá Andreassen 4, Malena Josephsen 2, Viviann Bjartalíð 1.

**Máltindurin**

| | | |
|---|---|---|
| Halltóra Joensen | VB | 16 |
| Rakul N. Joensen | B36 | 10 |
| Rannvá Andreasen | KÍ | 10 |
| Eyðfríð Christiansen | HB | 9 |
| Malena Josephsen | KÍ | 8 |
| Annika Godtfred | HB | 6 |
| Laila Jespersen | VB | 6 |
| Maria Johnson | HB | 5 |
| Elin Højsted | B71 | 4 |
| Gurið Mortensen | VB | 4 |
| Kristbjørg Isaksen | GÍ | 3 |
| Vivian Thorleifsson | HB | 3 |
| Mariann Joensen | KÍ | 3 |
| Irdi Hansen | NSÍ | 3 |
| Elin K.Mikkelsen | AB | 2 |
| Arnbjørg Danielsen | B36 | 2 |
| Elsebeth Jónsson | B36 | 2 |
| Laila Enghamar | B36 | 2 |
| Sólrun Olsen | B71 | 2 |
| Elsa Maria Simonsen | KÍ | 2 |
| Vivian Bjartalíð | KÍ | 2 |
| Sóleyð Einarsson | NSÍ | 2 |
| Rannvá Augustinusen | VB | 2 |
| Sóleyð Holm | VB | 2 |

**Støðan, bólkur A**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 5 | 5 - 0 - 0 | 26 | 2 | 24 | 15 |
| 2 VB | 5 | 4 - 0 - 1 | 35 | 5 | 30 | 12 |
| 3 Skála | 4 | 2 - 0 - 2 | 6 | 25 | -19 | 6 |
| 4 GÍ | 4 | 1 - 0 - 3 | 5 | 11 | -6 | 3 |
| 5 AB | 3 | 1 - 0 - 2 | 3 | 19 | -16 | 3 |
| 6 Sumba | 5 | 0 - 0 - 5 | 4 | 17 | -13 | 0 |

**Støðan, bólkur B**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 KÍ | 4 | 4 - 0 - 0 | 30 | 4 | 26 | 12 |
| 2 B36 | 4 | 3 - 0 - 1 | 25 | 10 | 15 | 9 |
| 3 NSÍ | 4 | 2 - 0 - 2 | 8 | 17 | -9 | 6 |
| 4 B71 | 4 | 1 - 0 - 3 | 7 | 15 | -8 | 3 |
| 5 EB/Str. | 4 | 0 - 0 - 4 | 1 | 25 | -24 | 0 |